UTTAN ÚR HEIMI

# Bera ótta fyri blóðbaði í Afghanistan


Mynd: Reuter

**Verður ikki skjótt atborið, kann søgan lættliga fara at endurtaka seg í Afghanistan við harðskapi og blóðbaði**

ÚTLAND

Tann skjóta framgongdin hjá Norðursamgonguni og hertøka hennara av høvuðsstaðnum Kabul er nakað, sum flestu afghanar fegnast um, men samstundis bera teir ótta fyri, at landsins blóðuga søga kann fara at endurtaka seg einaferð enn.

Bæði í Afghanistan og aðrastaðni bera fólk ótta fyri, at teir nógvu og á mangan hátt sera ymisku ættarbólkarnir, sum mynda Norðursamgonguna, fara at berjast um rovini, tá Kabul er tikin, og valdið skal býtast. Víst verður á, at samgongan hevur ongan leiðara, sum kann gera av, hvat gerast skal, men heldur fleiri leiðarar, sum hvør í sínum lagi vilja hava sum mest burtur úr sigrinum.

Grannalandið Pakistan, sum stuðlaði Taliban, hevur gjørt púra greitt, at landið kann á ongan hátt góðtaka, at Norðursamgongan fær valdið í Kabul. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Islamabad segði í gjár, at nú ræður um at sleppa undan einum blóðbaði í býnum og aðrastaðni í Afghanistan.

## Hevndarhugur

Pakistanska stjórnin krevur, at pasjtunararnir skulu fáa ávirkan á, hvussu Afghanistan verður skipað í framtíðini. Taliban hevði sín uppruna millum pasjtunararnar, og teir fóru mangan illa við teimum ættarbólkunum, sum í dag mynda Norðursamgonguna. Serliga tadjikar, usbekar og hazarar fingu mangan av at vita frá Taliban, sum m. a. beindi fyri 6000 úr hesum ættarbólkunum í býnum Mazar-i-Sharif í 1998. Tað er tí greitt, at hevnarhugurin er stórur millum teir, sum í dag mynda Norðursamgonguna.

ST-hákommiserurin í mannarættindamálum, Mary Robinson, sigur, at umheimurin má bera skjótt at. Hon vísir á, at Norðursamgongan hevur heldur ikki tað besta umdømið, hvat mannarættindum viðvíkir.

Tað hevur tó vakt ans, at leiðararnir í Norðursamgonguni hava boðið ST at taka lut í arbeiðinum at finna eina politiska loysn á viðurskiftunum í Afghanistan. Flest allir vesturlendskir politikarar eru eisini á einum máli um, at ST skal hava ein týðandi lut í hesum arbeiðinum.

## Boð eftir kongi

Eitt er at fáa eina skipan, annað er at finna ein leiðara, sum allir afghanar kunnu semjast um. Leiðararnir í Norðursamgonguni hava sagt, at teir vilja hava fyrrverandi kongin, Zahir Shah, at leiða eina skiftisstjórn.

Men kongurin sjálvur ivast. Úr útlegd síni í Rom hevur hann sagt, at Norðursamgongan sveik lyfti sítt, tá hon gjørdi av at senda hermenn inn í Kabul. Kongurin ber ótta fyri, at hermenninir hjá samgonguni fara at gera seg inn á fólkið í býnum.

- Vit ætlaðu ikki, at samgongan skuldi taka Kabul. Okkara ætlan er, at Kabul skal vera eitt hernaðarfrítt øki, og at ein stjórn og umsiting skulu skipast í býnum. Tað er ikki gjørt enn, og vit stúra fyri trygdini hjá fólkinum í býnum, segði talsmaður kongs í gjár.

**(Fartekst)**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Ragnar Samuelsen**

andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi týsdagin 13. november, 70 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*

**Sigrid, Elisabeth, Jóhann og Andras**

Tey, ið vilja minnast Ragnar, kunnu lata eina gávu til Herberg Frelsunarhersins, konto í peningastovnunum.

# Tøkk

Vit vilja senda eina tøkk til tey, ið sýndu

**Norðbjørt Djurhuus**
**Hvalba**

ein seinasta heiður. Eina serliga tøkk vilja vit senda teimum, ið ræ ttu eina hjálpandi hond við teimum praktisku uppgávunum.

*Avvarðandi*

**Andreas Djurhuus Thomsen**

## Elisabeth Simonsen

**f. 23.02.1954 d. 28.08.2001**



Ikki vardi tað okkum, tá Elisabeth fór í páskafrí, at hon ikki fór at koma aftur til arbeiðis. Vit vistu ikki betur, enn at hon var frísk. At hon skuldi doyggja so ung aftan á stutta sjúkrlegu, kennist sera meiningsleyst.

Elisabeth var útbúgvin sjúkrasystir í 1976. Í yrki sínum arbeiddi hon m.a. fleiri ár á B8. Í 1989 byrjaði hon á Skurðgongini. Har lærdu vit hana at kenna sum eina sera nærlagda og dugnaliga sjúkrasystir, sum altíð hevði umsorganina fyri sjúklinginum fremst í huganum. Hon gjørdi nógv við at menna deildina fakliga og persónliga. Tað kom serliga til sjóndar hetta seinasta góða árið, meðan hon var 1. assistentur.

Hóast Elisabeth gekk høgt upp í sítt arbeiði og gjørdi tað til lítar, ivaðust vit ongantíð í, at familjan altíð lá henni fremst í huga.

Minnini er góð. Neyvan gongur dagur, uttan tú leggur merki til eitthvørt, har hennara væla hond hevur verið. Vit sakna Elisabeth við hennara kláru lívsholdningum, rættlæti og spaka lyndi.

Okkara tankar fara til Mo, Kim og børnini, sum kenna saknin størstan.

Friður veri við minninum um góða starvsfelaga okkara Elisabeth.

**Starvsfelagarnir á Skurðgongini**



# Biografur í Atlantis fyri jól

**Nýggi leiðarin í Atlantis ætlar at seta gongd í filmsýningarnar fyri jól**

FILMUR

*Eyðun Klakstein*



**Klaksvik:** Um nakrar vikur sleppa norðoyingar væntandi í biograf aftur.

Leingi hevur verið arbeitt við at fáa filmssýningar í Atlantis aftur, og nýggi leiðarin fyri húsið vónar, at hesa sýningar kunnu byrja um stutta tíð.

– Vit fara at arbeiða fram ímóti, at vit kunnu sýna filmar aftur longu tíðliga í desember mánaði, sigur Jógvan Eliasen.

Tá umbygda Atlantis lat upp í august mánaði í 1997 var biografur í húsinum. Hetta var gjørt í samstarvi við Havnar Bio.

Filmssýningarnar í Atlantis steðgaðu árið eftir, men nú er ætlanin at taka samstarvið við Havnar Bio uppaftur, so nýggir filmar kunnu síggjast á hvíta tjaldinum í Klaksvík.

*– Umráðandi er, at vit skapa góðar og hugnaligar umstøður kring biografin, so fólk hava hug at koma til filmarnar. Skal tað bera til, so mugu fólk eisini brúka biografin, sigur Jógvan Eliasen*

## Ber til

Í løtuni spælir Klaksvíkar Sjónleikarfelag skemtileikin Mostir Charley, og nýggi leiðarin skal í framtíðini fáa sjónleikin, biografin og onnur mentanarlig tiltøk at passa saman í húsinum

– Tær vikurnar, tá sjónleikur verður spældur í Atlantis, verður neyvan gjørligt við regluligum filmssýningum, men hina tíðina á árinum skuldi tað borið væl til, sigur Jógvan Eliasen.

– Umráðandi er, at vit skapa góðar og hugnaligar umstøður kring biografin, so fólk hava hug at koma til filmarnar. Skal tað bera til, so mugu fólk eisini brúka biografin, sigur hann.

# Øssur og póllendingur sýna fram

**Øssur Mohr úr Fuglafirði fer at hava framsýning saman við pólskum listarmanni í Norðurjútlandi komandi vikurnar**

LIST

*Eyðun Klakstein*

Leygardagin letur ein framsýning upp í Gallarí Bram í Hobro, har Øssur Mohr er annar av listamonnunum, sum næsta slaka mánaðin fara at sýna verk fram har.

Fuglfirðingurin Øssur Mohr hevur verið við á nógvum framsýningum í Føroyum og Danmark seinastu árini.

Hann verður alsamt oftari biðin til framsýningar í Danmark, og nú fer hann at sýna fram við einum kendum pólskum listarmanni.


*Næstu vikurnar hevur Øssur Mohr framsýning í norðurjútska býnum Hobro*

## Íblásturin

Kaplanski er kendur og virdur í heimlandi sínum, men hann hevur eisini sýnt fram í Danmark áður. Bæði hann og Øssur fáa íblástur úr náttúrini, og tí hevur Gallarí Bram valt at seta teir saman til eina serliga framsýning.

Gallarí Bram fekk eygað á Øssur Mohr, tá leiðarin fyri gallaríið var í Føroyum og hugdi eftir listaframsýning fyri nøkrum árum síðani.

Øssur Mohr verður við til ferniseringina í Hobro, sum verður leygardagin klokkan 14.00. Framsýningin er opin til fram til 7. desember.

## Nógv tiltøk í SMS!

**Tíðindaskriv:**

Hetta vikuskiftið verður Torgið í SMS aftur karmur um mong fjølbroytt tiltøk. Vitjandi kunnu síggja alt frá barnatekningum til jólagávu og -kalendara-hugskot, frá feittleysum pannum til barnainnbúgv.

### Nýggj vøra úr India

Fríggja- og leygardagin hevur nýggi gávuhandilin í SMS, Mango, sølubás á Torginum. Sita, sum eigur Mango, sigur, at hon hevur fingið nógva nýggja vøru heim úr Inda hesa vikuna, og tað verður m.a. tann vøran, sum verður seld á Torginum hesar báðar dagarnar. Afturat hesum, verður vøra, sum hevur verið til keyps í handlinum, í tíðarskeiðnum síðan hann lat upp 26. septembur.

Sita sigur, at hon eisini hevur nógv góð jólagávu- og -kalendarahugskot, umframt mong góð tilboð, sum bert eru galdandi fríggja- og leygardagin.

### Framsýning við barnatekningum

Hesa vikuna eru nógvar barnatekningar at síggja á Torginum í SMS. Talan er um tekningar, sum børn í Føroyum hava teknað í sambandi við teknikappingina hjá Amnesty International.

Amnesty roynir at fáa londini í heiminum at virða mannarættindi, og arbeiðir ímóti píning, deyðarevsing og øðrum ómenniskjansligum fyribrigdum.

Við tekningunum hava føroysku børnini roynt at lýst tey fólkini, sum Amnesty roynir at hjálpa. Ein dómsnevnd velur út tríggjar tær bestu tekningarnar, sum fáa virðisløn.

1. virðisløn er ein fløgu- og bandspælari frá Elding.

2. virðisløn er gávukort á 1.000 kr. frá Schan.

3. virðisløn er pitsa frá pitsacaféini á Sjómansheiminum, bovling í Bovlinghøllini á Hálsi og ríðitúrur á Berg Hestum, alt fyri 4 persónar!

Harafturat fáa allir tríggir vinnararnir bókina, Heimsins Lond, frá Føroya Skúlabókagrunni. Virðislønirnar verða handaðar á Torginum í SMS leygardagin, 17. novembur kl. 12.00.

### Feittleysar pannur

Danska fyritøkan, Gastrolux, framleiðir serligar pannur, grýtur og annað til dagligu matgerðina. Tað, sum er serligt við hesum køksbúnýti, er, at tað ikki er neyðugt at steikja matin í feitti. Og hetta er nevnliga eitt, sum mong okkara ynskja.

Í Føroyum eru tað hjúnini, Krista og Fríðbjørn Poulsen úr Vestmanna, sum umboða Gastrolux. Tey siga, at áhugin í Føroyum fyri framleiðsluni hjá Gastrolux er ógviliga stórur.

Fríggjadagin 16. og leygardagin 17. november kunnu vitjandi í SMS eisini vitja sølusframsýningina hjá teimum báðum á Torginum.

### Barnainnbúgv

Fríggjadagin 16. og leygardagin 17. november verður barnahandilin, Piff Paff Puff, á eisini Torginum. Handilin, sum læt upp 14. juli í ár í Sandavági, er ikki nakar vanligur barnahandil. Birita, sum eigur handilin, sigur, at hon við nýggja og øðrvísi handlinum leggur seg eftir at selja barnainnbúgv.

Nevnast kann m.a. tapet, meturvørur og kurvar til barnakømur. Aftur at hesum selur Birita eisini útlendsk sniðklæðir.

– Birita er útbúgvin prýðari, og hetta ber handil hennara eisini á brá av. – Eg havi lagt meg eftir at geva viðskiftafólki mínum eina heildarupplivingn, tá ið tey støkka inn á gólvið, sigur Birita at enda.

PostScriptPicture
(L\340sing-sosialurin.eps)